gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Mentan á gáttini til eina nýggja øld

**Nordisk Kultur Institut hevur givið út eitt álit um føroyskan mentunarpolitikk undir heitinum Færøsk Kulturpolitik - ved indgangen til et nyt århundrede**

MENTAN
*Turið Kjølbro*




Tað er Jette Forchhammer, mentanarsosiologur og høvundur, sum hevur ritstjórnað álitið um føroyskan mentapolitikk á gáttini til eina nýggja øld, ið er komið út sum bók. Nordisk Kultur Institut gevur út. Álitið er tað fyrsta í eini røð í felags norðurlendskari granskingarverkætlan undir heitinum Nordisk kulturpolitikk under forandring. Mentamálastýrini í norðurlondum og Nordisk Kulturfond fíggja verkætlanirnar. Leiðari er Peter Duelund, ið starvast á Nordisk Kultur Institut í Keypmannahavn.

Í tíðindaskrivi sigur ritstjórin, at fyri at skilja føroysku støðuna í sambandi við orðaskiftið um fullveldi er tað umráðandi at seta ljóskastaran á margfeldni í mentanini. Ymsu álitini lýsa og greina mentapolitikkin í fimm norðurlondum umframt sjálvstýrisøkjunum og samiska mentanarøkinum á gáttini til eina nýggja øld. Spurningar, ið eru uppi at venda eru eitt nú: hvørji rák hava verið tey týdningarmestu í menningini, eru felagseyðkenni og munir landanna millum og í mun til Euopa, kunnu vit tosa um eina serliga norðurlendska mentan.

### Stríðshugaður einstaklingar

Jette Forchhammer, sum áður hevur granskað sjónvarpsvanar hjá føroyskum børnum, hevur staðið fyri føroyska partinum av verkætlanini. Hon hevur ritstjórnað bókina í samstarvi við føroyingar, ið eru virknir innan føroyska mentan.

Mentapolitikkurin í Føroyum minnir ikki sørt um mentapolitikkin í norðurlondum, verður sagt. Eftir seinna heimsbardaga og eftir, at heimastýrislógin kom í gildi í 1948, er føroyski mentapolitikkurin bygdur upp sum ein partur av felags vælferðarpolitikki fyri alt fólkið, har dentur er lagdur á stuðul umframt ein fólksligan felagskap. Í mun til tey stóru norðurlondini við væl útbygdari umsiting og fyrisiting umframt stórum tjóðarligum mentanarstovnum, eru mentanarstovnarnir og almenni mentapolitikkurin í Føroyum fyrst og fremst bygdir upp av stríðshugaðum einstaklingum. Hetta áhaldandi stríðið hevur viðvirkað til eina sjálvstøðuga føroyskan mentan, sum hevur gjørt tað møguligt hjá Føroyum at taka lut í norðurlendskum mentanarsamstarvi.

Staðfest verður í álitinum, at enn er nógv at stríðast við. Ikki minst danska yvirharradømið og ræðið á málsliga og mentanarliga økinum, og vantandi fatanin hjá politikarum fyri, at mentan og list kosta. At Føroyar liggja so fjarskotnar hevur noytt nógv listafólk í útlandið eftir neyðuga íblástrinum og útbúgvingini.

### Vandamál

Álitið lýsir mentanarpolitisk vandamál í einum søguligum og altjóða sjónarringi. Tað setir spurnartekin við í hvønn mun mentapolitikkurin er eydnast, og hvørjar trupulleikar listin og mentanin nú standa yvir fyri. Somuleiðis lýsir álitið serligar avbjóðingar, sum politiska støðan í Føroyum gevur høvi til, og kastar eisini ljós yvir avbjóðingarnar, ið koma í kjalarvørrinum av møguligari loysing frá ríkisfelagsskapinum.

Í Færøsk Kulturpolitik - ved indgangen til et nyt århundrede skrivar Jette Forchhammer drúgvan inngang við søguligum baksýni. Elin Súsanna Jacobsen, adjunkt, ph.d., skrivar søguligt yvirlit, Jógvan í Lon Jacobsen, adjunkt, mag.art., skrivar um føroyska málið, Bárður Jákupsson, stjóri í Listaskálanum, skrivar um myndlist, Martin Næs, landsbókavørður, og Steinbjørn B. Jacobsen, høvundur, skriva um bókmentir, Birita Mohr, sjónleikari, skrivar um sjónleik. Martin Mouritsen, musikskúlastjóri, og Kristian Blak, cand.mag., skriva um tónleik, Karin Elsubudóttir skrivar um Norðurlandahúsið, Jeanette Blåsvær, Jákup Thorsteinsson og Jóannes Dalsgaard skriva vegna Mentamálastýrið um mentanarpolitisku ætlanirnar hjá landsstýrinum, og Gunnar Hoydal, høvundur, skrivar eftirmæli, Umframt eru yvirlit yvir játtanir til mentan og list.

Færøsk Kulturpolitik - ved indgangen til et nyt århundrede er eitt sera forkunnugt og hent álit um føroyska mentan og list. Tað gevur innlit í nógv brigdi í mentanini og lýsir væl avbjóðingarnar, listin og mentanin standa yvir fyri, nú ein nýggj øld er byrjað. Bókin kann bíleggjast frá Nordisk Kultur Institut.


## Tað gongur so skjótt...

Handspring Visor Platinum er 50% skjótari enn Visor Deluxe. So kanst tú halda skil á øllum - og tað gongur øðiliga skjótt.
At spæla spøl, móttaka data, brúka vanlig programm - alt gongur sera skjótt á Visor Platinum. Og við Springboard expansion kanst tú stilla um til digitalkamera, tráðleyst modem ella fartelefon...



handspring

Kr. 3.685,-

...við Visor Platinum

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 322535 · E-mail: elektronik@3-arin.com


# Mótmæla afturlating

**Tvangsflytingin á aðrar psykiatriskar deildir ørkymlar sinnisliga sjúk, sigur Sinnisbati**

MÓTMÆLI
*Turið Kjølbro*

Enn eina ferð heitir felagið Sinnisbati á leiðsluna á Landssjúkrahúsinum um ikki at steingja psykiatrisku deildirnar ávís tíðarbil. Frá komandi sunnudegi og ein mánað fram verður psykiatriska deild 3 á Landssjúkrahúsinum afturlatin.

Felagið hevur fleiri ferðir áður gjørt vart við óhepnu og ørkymlandi avleiðingarnar, ið kunnu standast av, at sinnisliga sjúk fólk verða tvangsflutt á aðrar psykiatriskar deildir ella at fara heim í úrtíð. Sinnisbati mótmælir hesi mannagongd, fer gjølla at fylgja við málinum og vónar, at hetta ikki fer at endurtaka seg í framtíðini.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



POLITIKKUR & SAMFELAG

# Buldribassin er farin

**Rokaligi skiparin er nú farin av brúnni í Mentamálastýrinum. Nýggjur skipari er hovligi skúlalærarin úr Vági, Óli Holm**

VAKTARSKIFI
*John Johannessen*



*Vaktarskifti á Mentamálastýrinum. Óli Holm tók í gjár við sum nýggjur landsstýrismaður í mentamálum eftir Tórbjørn Jacobsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tórbjørn Jacobsen er nú minstraður av sum skipari á føroysku mentanarskútuni. Og seinnapartin í gjár var Óli Holm hjá løgmanni og mysntraði sum nýggjur skipari.

Orsøkin til vaktarskiftið er, at Tórbjørn Jacobsen hevur tikið avleiðingarnar av, at hann er ov bulraligur í atburði – so mikið buldraligur, at hann sambært skúlastjóranum í Vestmanna tveitti varaskúlastjóran á dyr, tí hon var donsk. Og so mikið rokmikil, at hann í øði alment skýrdi løgmann at vera danskan leigusvein.

Tórbjørn Jacobsen viðurkennir, at hann er rokmikil av lyndi. Orsøkina sigur hann vera, at hann er sjómaður, og tí hevur sjómanslyndi - hóast tað eru teir fægstu sjómennirnir, ið bera seg at sum Tórbjørn.

Nýggi skiparin, Óli Holm, er ikki skiparalærdur. Hann hevur danska læraraútbúgving frá Nørre Nissum Seminarium, og hevur fyrst starvast sum lærari í Danmark, og síðani í nógv ár sum varaskúlastjóri – ella kanska stýrimaður í Vágs skúla.

Tó hevur Óli Holm sínar røtur á sjónum. Pápi hansara, Alfred Holm, var kendur skipari í Vági, og sjálvur hevur Óli eisini verið nógv til skips.

Men róp og geyl og ta stóru garteringina skulu vit kortini ikki vænta okkum av Óla Holm. Hann er kendur, sum ein hóvligur maður, ið arbeiðir í tí stilla og fær nógv burtur úr, hóast hann ikki ger so nógv burtur úr sær sjálvum.

– Tú fært meg ikki at leggja beinini upp á borðið, segði Óli Holm, tá Sosialurin í gjár bað um at fáa mynd av nýggja landsstýrismanninum handan skrivaraborð sítt.

Álendski mentamálaráðharrin:

## Tórbjørn er hugtakandi

**Tað er synd, at Tórbjørn Jacobsen fer frá, sum landsstýrismaður. Hetta heldur álendski mentamálaráðharrin, Gun Carlsson, sum hevur verið hugtikin av Tórbjørn, síðani fyrstu ferð, tey møttust**

VITJAN
*John Johannessen*

– Eg haldi tað vera synd, at Tórbjørn Jacobsen nú fer frá, sum landsstýrismaður í mentamálum. Tí eg trúgvi, at hann er góður fyri Føroyar.

Soleiðis segði álendski mentamálaráðharrin, Gun Carlsson, sum hesa vikuna hevur vitjað í Føroyum, á tíðindafundi í Mentamálastýrinum mikudagin.

Vitjanin í Føroyum kom í lag, eftir at Tórbjørn Jacobsen á almennari vitjan í Álandi í fjør, beyð Gunn Carlsson at koma til Føroya.

### Hugtikin frá fyrstu ferð

Gun Carlson og Tórbjørn Jacobsen hittust fyrstu ferð, tá Tórbjørn Jacobsen var á síni fyrstu almennu uppgávu uttanlands. Hetta var á norðurlendskum fundi í Århuus.

Á fundinum í Århus helt Tórbjørn Jacobsen eina av sínum kendu, mergjaðu røðum. Og røðan hugtók álendska mentamálaráðharran so nógv, at hon beinan vegin beyð Tórbjørn at koma til Álands. Tórbjørn tók av, og síðani hevur sambandið millum mentamálaráðharrarnar í báðum smálondunum verið av tí allar besta.

### Kann læra av Føroyum

Álendski mentamálaráðharrin heldur tað vera nógv á skúla- og mentanarøkinum í Føroym, sum álendingar kunnu læra av. Millum annað heldur Gun Carlsson tað vera ógvuliga áhugavert, at til dømis føroyskir maskinmeistarar hava møguleika at taka pedagogisk skeið, og síðani sleppa at undirvísa á maskinskúlum.

– Hetta er avgjørt ein skipan, ið vit eru áhugað í og ynskja at fáa í Álandi. Eisini eru vit ógvuliga hugtikin av tykkara útvarpi. Í Álandi hava vit einki útvarp, segði Gun Carlsson á tíðindafundinum mikudagin.

Men Tórbjørn Jacobsen heldur eisini, at føroyingar kunnu læra nógv av Álendingum. Til dømis vísir hann á, at í Álandi eru fysisku karmarnir hjá skúlunum langt framman fyri karmarnar í Føroyum.

# Óli stovnar mentanarráð

**Nýggi landsstýrismaðurin í mentamálum ætlar sær at stovna eitt mentanarráð eftir sama leisti, sum Búskaparráðið. Mentanaráðið skal geva landsstýrismanninum reglulig tilmæli um mentan. Eisini ætlar Óli Holm at royna at samantvinna oljuvinnu og mentan**

MENTAN
*John Johannessen*

Óli Holm, nýggjur landsstýrismaður í mentamálum, hevur tvær persónligar ætlanir, hann ætlar sær at fáa framdar í sínum skeiði, sum landsstýrismaður.

Fyrsta ætlanin er at stovna eitt óheft mentanarráð, sum skal umboða mentan í breiðum týdningi. Tað vil siga, at í ráðnum skulu sita fólk, ið umboða breiða spektrið í mentanini, heilt frá ítróttinum til leiklistina.

– Hetta ráðið skal so, eins og Búskaparráðið ger um búskap, geva landsstýrismanninum reglulig tilmæli um mentanarpolitikk, sigur Óli Holm.

### Brynjar seg móti oljuni

Onnur ætlanin hjá Óla Holm er at fáa samantvinna oljuvinnuna og mentanarpolitikk. Tí ætlar hann sær at seta fólk at kanna og gera tilmæli um mentanarpolitikk í sambandi við oljuvinnu.

– Vit fara nú undir eina nýggja vinnu, sum so ella so fer at hava ávirkan á okkara samfelag. Tað er alneyðugt, at vit brynja okkum til eisini at taka við hesi mentanarligu avbjóðing. Verður olja funnin, so kann hetta fáa stóra ávirkan á okkara mál, mentan og livihátt – og eisini fyri okkara bústaðarmynstur.

– Tí fari eg at seta skjøtil á, hvørji amboð og hvørji tiltøk, vit eiga at hava til reiðar til tess at brynja okkum til at taka við hesi avbjóðing, segði Óli Holm á tíðindafundi hósmorgunin, áðrenn hann seinnapartin tók við sum nýggjur landsstýrismaður í mentamálum.

### Betri samskifti við skúlan

Óli Holm er júst farin úr starvinum sum varaskúlastjóri í Vági, fyri at kunna taka við starvinum sum landsstýrismaður. Tí er hann ein maður, ið hevur gott innlit í skúlaverkið.

Hesar royndir ætlar Óli Holm sær at nýta til fulnar í landsstýrissessinum. Hann ætlar sær at fáa kortlagt átroðkandi trupulleikarnar í fólkaskúlanum og at fáa betrað samskiftið við skúlaleiðslurnar um teirra trupulleikar.

Hetta er uttan iva nakað, ið skúlaleiðslurnar gleða seg til. Tí samskiftið millum Tórbjørn Jacobsen og skúlaleiðslurnar hevur ikki verið av tí besta seinastu tíðina.

– Eg havi avmarkaða tíð, tað sum eftir er av hesum valskeiðnum. Men eg fari at leggja meg eftir at fremja og avgreiða tær mongu ætlanirnar, sum eru stungnar út í kortið, at loysa átroðkandi trupulleikar og at seta nakrar nýggjar ætlanir í verk, segði Óli Holm á tíðindafundinum hósdagin.


PlayStation.2

## Junglubókin og dansimotta



Stuttliga Playstation spælið við Mowgli og hansara vinum.
Við spælinum fylgir stuttliga dansimottan - har tú dansar á joystickinum...!

Kr. 675,-

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 322535 · E-mail: elektronik@3-arin.com